


## FUNDIR, TILTØK O.A. Í JUNI M.A.:

**3. juni**. Sendiharrin tekur lut í “Nordic Lunch”, sum er samstarvsfora millum norðurlendsku sendiharrarnar.

**4. juni**. Sendiharrin vitjar og fundast við ReSource International.

**10. juni**. Vitjan av nýggja japanska sendiharranum, Hitoshi Ozawa.

**12. juni**. Umboð fyri íslendsku trygdardeildina hjá løgregluni kemur á vitjan.

**13. juni**. Svenska sendistovan skipar fyri havfiskiferð fyri norðurlendsku- og ES sendistovunum saman við íslendska UM.

**17. juni**. Sendimaðurin tekur lut í hátíðarhaldinum í sambandi við ísl. tjóðardagin.

**22. juni**. Vitja og fundast við borgarstjóran í Vestmannaoyggjunum, Íris Róbertsdóttur.

**22.-24.** juni vitjar Westward Ho í Siglufirði. Sendistovan verður partur av hesum tiltaki.

## FORSETAVAL

Forsetaval verður 27. juni og hava tveir kandidatar boðað frá, at teir stilla upp. Verandi forseti, Guðni Th. Jóhannesson, stillar upp aftur (varð fyrstu ferð valdur í 2016) og Guðmundur Franklín Jónsson er einasti avbjóðari.



*Mynd 2. Guðni Th. Jóhannesson, forseti.*

Guðni Th. Jóhannesson, forseti, er 51 ár og m.a. útbúgvin søgufrøðingur og doktari í søgu. Frá 2013 til 2016 undirvísti Guðni í søgu í Háskóla Íslands, sum lektari, dosentur og professari.



*Mynd 1. Guðmundur Franklín Jónsson, avbjóðari*

Guðmundur Franklín Jónsson, hotellstjóri í Danmark, er 56 ár og útbúgvin búskaparfrøðingur og hevur verið hotellstjóri í Danmark síðan 2013. Guðmundur bjóðaði seg fram til forsetavalið í 2016, men tók seg aftur undan valinum. Í 2010 var Guðmundur við til at stovna flokkin Høgri grønir. Flokkurin vann ikki inn um tinggátt. Flokkurin varð tikin av í 2016.

> *»Nýggjasta veljarakanningin, ið varð gjørd í tíðarskeiðinum 29. mai til 3. juni 2020, vísir, at 90,4% av íslendsku veljarunum stuðla Guðna Th. Jóhannesson, sitandi forseta, meðan bert 9,6% vilja seta krossin við avbjóðaran Guðmund Franklín Jónsson. «*

Nógv skal broytast, skal tað eydnast Guðmundi at koma í forsetaembætið 1. august 2020. Litið er tí at ivast í, at Guðni Th. verður afturvaldur við valið 27. juni 2020.

**Korona støðan** í Íslandi hevur havt stóra ávirkan á búskapin og arbeiðsmarknaðin. Ferðafólkatalið, sum vanliga er um 14. – 18.000 um dagin, fall í mars stórt sæð niður í einki. Seðlabanki Íslands metir, at ferðafólkatalið fyri alt 2020 einans verður um 400.000, harav størsti parturin longu var komin áðrenn korona farsóttina. Annars hevði Seðlabankin undan COVID-19 farsóttina mett, at tað fóru at koma uml. 2 mió. ferðafólk til Íslands í 2020. Roknað verður við, at útflutningsvirði

Íslands lækkar við 30% í ár, harav ferðavinnan stendur fyri nógv tí størsta partinum.

**Sjúkrarøktarfrøðingafelag Íslands** hevur ikki havt sáttmála við íslendsku myndugleikarnar í gott eitt ár. Í aprílmánaði í ár varð sáttmáli undirskrivaður, men við uratkvøðu vrakaðu gott 85% av limunum sáttmálauppskotið. Gott 82% av limunum tóku lut í atkvøðugreiðsluni. Koma sáttmálaviðurskiftini ikki undir land áðrenn 22. juni, so fara sjúkrarøktarfrøðingarnir í verkfall. Um so skuldi verið, so fer tað at skapa stórar avbjóðingar viðv. kanningum av ferðafólkum á flogvøllum o.a. Væntast kann neyvan, at stjórnin fer at góðtaka, at so verður.

## FIMTA STØRSTA BÚSKAPARLIGA AFTURSTIGIÐ

Um metingin hjá Seðlabanka Íslands um 8% afturgongd í búskapinum í hesum ári heldur, so verður tað størsta afturgongdin í einum ári síðan 1920. Verður hugt at búskaparliga afturstignum, sum fylgdi fíggjarkreppuni fyri góðum 10 árum síðan, var hon størri, men hetta skeið er fimta størsta niðurgongutíðin síðan mátingar byrjaðu.

Hóast roknað verður við vøkstri næsta ár, so verður mett, at BTÚ verður um 180 mia. ISK (~9 mia. DKK) lægri í 2022 enn spátt varð áðrenn koronafarsóttin gjørdi um seg. Stór óvissa er um forsøgn Seðlabankans. Tann mest svartskygda forsøgnin er grundað á, at farsóttin kemur aftur og at eftirspurningurin lækkar næsta ár. Í tí føri verður roknað við einari afturgongd í BTÚ uppá 10%. Hinvegin, um búskapurin kemur skjótari fyri seg, verður afturgongdin í BTÚ mett til 6%. Miðal forsøgnin er mett til 8% afturgongd í BTÚ.

*Sí meira her (á íslendskum)*

Sjey djúpastu kreppur í Íslandi í 140 ár.




***Mynd 3**. Sjey av djúpastu kreppunum í Íslandi í 140 ár. Størsta kreppan var undir fyrra heimsbardaga við 17,9% lækking, í 1882-83 var afturgongdin 16,1% og í 1920 14%. í 2009-2010 undir fíggjarkreppuni var afturgongdin 10%. Og í 2020 verður roknað við -8%.*

## ÍSLENDSKI ÚTFLUTNINGURIN TIL FØROYA VAKSANDI

Íslendski útflutningurin til Føroya (= føroyski innflutningurin úr Íslandi) er vaksin nógv fyrstu 4 mánaðirnar av 2020, samstundis sum innflutningurin úr Føroyum til Íslands (=føroyskur útflutningur til Íslands) er minkaður eitt sindur. Verða fyrstu 4 mánaðirnir av 2020 samanbornir við sama tíðarskeið í fjør (sí myndina til vinstru), so sæst, at íslendski útflutningurin samlað sæð er vaksin úr 1.162 mió. ISK (~58 mió. DKK) í 1.994 mió. ISK (~100 mió. DKK) ella við uml. 72%, meðan føroyski innflutningurin til Íslands samlað sæð í sama tíðarskeiði er minkaður úr 665 mió. ISK (~33mió. DKK ) niður í 517 mió. ISK (~26 mió. DKK) ella við uml. 22%.




***Mynd 4**. Samanbering av útflutningi og innflutningi Íslands við Føroyar fyrstu 4 mánaðirnar av 2020 við sama tíðarskeið í 2019. Sum tað sæst, so er íslendski útflutningurin til Føroya vaksin nógv fyrstu 4 mánaðirnar av 2020 samanborið við sama tíðarskeið í 2019.*

Verður hugt nærri at ársvakstrarferðini (t.e. gongdin seinastu 12 mánaðirnar (mai 2019 til apríl 2020) í mun til 12 mánaðirnar frammanundan (mai 2018 til apríl 2019)), so er føroyska ársvakstrarferðin -4%, meðan íslendska ársvakstrarferðin er +24%. Tað, sum serliga ger munin, er gongdin fyrstu 4 mánaðirnar í 2020, har íslendski útflutningurin veksur nógv, meðan føroyski útflutningurin er í lítlari minking. Ikki ber til at koma afturum tølini enn og síggja, hvørjar vørur talan er um, sum handilstølini fevna um, men okkurt kundi bent á, at íslendski útflutningurin ikki hevur verið ávirkaður av korona farsóttini, heldur tvørturímóti, meðan føroyski útflutningurin er minkaður.

Verður hugt at samlaða útflutninginum hjá Íslandi við øll útlond fyrstu 4 mánaðirnar í ár, samanborið við fyrstu 4 mánaðirnar í 2019, so sæst, at íslendski útflutningurin er minkaður við 12% og íslendski innflutningurin er minkaður við 10%.

## UTTANRÍKISPOLITISKA FRÁGREIÐINGIN LØGD FRAM




*Mynd 5. Guðlaugur Þór Þórðarson, uttanríkis- og menningarsamstarvsráðharri hevur lagt frágreiðing sína um uttanríkis- og altjóðamál fram, har m.a. Føroyar eru umrøddar í fleiri førum.*

Guðlaugur Þór Þórðarson, uttanríkis- og menningarsamstarvsráðharri hevur lagt fram frágreiðing sína um uttanríkis- og altjóðamál. Frágreiðingin gevur eitt víttfevnandi yvirlit yvir støðuna hjá Íslandi á uttanríkisøkinum og tær mest umráðandi hendingar á hesum øki seinastu 12 mánaðirnar. Uttanríkisráðharrin legði dent á í sínari røðu í Altinginum, at uttanríkishandil er fortreyt fyri at góðu lívskorini hjá íslendingum kunnu halda fram. Fríhandilsavtalur eru gjørdar við 74 lond, sum fevna um næstan 2,9 mia. íbúgvar ella rúmliga ein triðing av heimsins fólkum. Gjøgnum íslendska limaskapin í EFTA hevur Ísland gjørt 29 avtalur við 40 lond og landaøki.

Føroyar eru nevndar fleiri ferðir í frágreiðingini. M.a. stendur um Hoyvíkssáttmálan (s. 65), at fyrireikingar eru í gongd í ár millum Ísland og Føroyar um Hoyvíkssáttmálan, og tað eru góðar vónir um enn sterkari fíggjarligt og handilsligt samstarv við hesa vinatjóð komandi árini. Búskapurin í Føroyum er sera góður og Føroyar eru fremst innan alivinnu. Tað er tí upplagt fyri íslendingar at leita sær til Føroya í sambandi við at uppbyggja hesa vinnugrein í Íslandi.

*Sí meira her (á íslendskum, har áhugaverda frágreiðingin eisini sæst)*

## ÍSLAND OG BRETLAND STYRKJA SAMBANDIÐ ENN MEIRA



***Mynd 6**. Íslendski úttanríkisráðharrin, Guðlaugur Þór Þórðarson og enski ráðharrin fyri evropeisk grannaskap og Amerika, Wendi Morton, hava undirskrivað felags yvirlýsing um samstarv næstu 10 árini.*

Ísland og Bretland eru komin ásamt um eina felags visjón, sum lýsir tey týdningarmiklastu samstarvsøkini millum londini bæði næstu 10 árini. Íslendski uttanríkisráðharrin, Guðlaugur Þór Þórðarson, og enski ráðharrin fyri evropeiskan grannaskap og Amerika, Wendi Morton, hava skrivað undir felags yvirlýsing. Endamálið við avtaluni er at styrkja tvíliðaðu viðurskiftini millum bæði londini við felags tiltøkum, sum stílar ímóti at økja vælferð, burðardygd og trygd. Íslendski uttanríkisráðharrin sigur m.a. í hesum sambandi: “Ísland og Bretland hátíðarhalda 80 ára diplomatiskt samband í ár. Undirskrivaða felags yvirlýsingin markerar ein varða í viðurskiftunum millum londini bæði. Visjón 2030 skjalið er eitt prógv um tættu sambondini millum Ísland og Bretland.”

Samstarvsøkini eru 1) vinnulív og íløgur, 2) fiskivinna, 3) gransking og nýmenning, 4) regionalt og altjóða samstarv, 5) verja og trygd og 6) veðurlagsbroytingar og Arktisk viðurskifti millum londini.

Tað verður íslendski sendiharrin í Bretlandi og bretski sendiharrin í Íslandi, sum skulu leiða og tryggja at málini verða rokkin.

*Sí meira her (á íslendskum) og her (á enskum við felags yvirlýsingini)*

## ÍSLENDSKA UTTANRÍKISTÆNASTAN 80 ÁR



**Mynd 7**. *17. juni 1944 varð lýðveldi Ísland sett á stovn. Á myndini síggjast diplomatar á sendistovuni í Washington DC taka gamla skjaldrarmerkið niður. F.v. Þórhallur Ásgeirsson (seinni aðalstjóri í Handilsmáláráðnum), Henrik Sv. Björnsson sendiráðsritari (seinni aðalstjóri) og Thor Thors, sendiharri*

Í apríl vóru 80 ár síðan íslendska uttanríkistænastan varð sett á stovn. Uttanríkisráðið varð sett á stovn sum sjálvstøðug eind 10. apríl í 1940, við ábyrgd fyri uttanríkispolitikkin hjá kongsríki Íslands.

Í fyrsta áratígginum limaði uttanríkistænasta Íslands seg inn í Heimsbankan sum ein av stovnarunum í 1945, Sameindu Tjóðir í 1946, árið eftir at felagsskapurin varð settur á stovn og sum stovnandi limur í NATO í 1949. Frí handilsviðurskifti og regionalt samstarv hevur altíð verið ein týðandi táttur í íslendska uttanríkispolitikkinum. Í 1970 fór Ísland uppí EFTA (European Free Trade Association) og í 1992 í EBS (Evropeiska búskaparliga samstarvið).

Í ár eru tað 100 ár síðan íslendska sendistovan í Keypmannahavn lat upp, sum fylgi av samveldissáttmálanum við Danmark í 1918. Eitt generalkonsulát varð latið upp í New York í 1940, sendistova í London og Stokkhólmi seinni sama ár og sendistova í Moskva í 1944. Í dag hevur Ísland 26 diplomatiskar sendistovur í 21 londum runt um í heiminum og 240 heiðurskonslar í meira enn 90 londum. Harumframt eru seks sendiharrar staðsettir í Reykjavík, akkrediteraðir í eitt tal av londum.

Til at markera 80 ára haldið fyri íslendsku uttanríkistænastuna, er ein heimasíða, sum vísir eitt søguligt yvirlit, sett á stovn (bert á íslendskum).

*Sí meira her (á íslendskum) og her (á enskum)*

## LESANDI Í TRUPLARI STØÐU



*Mynd 8. Jóna Þórey Pétursdóttir, forkvinna í ráði teirra lesandi í Háskóla Íslands.*

Lesandi á lærdum háskúlum í Íslandi hava fyrr gjørt vart við trongu fíggjarligu støðuna, nógv lesandi eru í. Ísland veitir ikki fíggjarligan lestrarstuðul og hóast lestur á almennu lærdu háskúlunum ikki krevur gjald, skulu lesandi kortini gjalda árligt innskrivingargjald. Korona kreppan rakar tey lesandi hart, sum nú stúra fyri komandi summarmánaðunum, tá flest lesandi fáa sína høvuðsinntøku. Kanning, gjørd á Háskúla Íslands, vísir, at um 40% av lesandi á Háskúla Íslands ikki fáa arbeiði í summar ella gerast arbeiðsleys. 11% halda seg ikki fara at megna at gjalda fyri mat og uppihald komandi mánaðin og 20% óttast, at tey missa bústað. Íslendska stjórnin hevur lurtað eftir neyðarrópinum hjá teimum lesandi og hevur avgjørt at lætta um lestrarlánið hjá teimum lesandi. Rentan á láninum verður lækkað og afturgjaldið tískil eisini. Harumframt verða 800 mió. ISK (~40 mió. DKK) veittar til stuðul til summarskúlaskeið, íverksetara verkætlanir og meiri enn 3.000 summarstørv. "Óvanligar umstøður kalla á óvanligar loysnir. Á henda hátt gerast tey lesandi skjótari liðug og koma tí skjótari útlærd út í vinnulívið, ið fer í gongd aftur fyrr enn seinni, og eins og áður, verður stórur tørvur á fólki við góðari útbúgving", sigur Lilja Alfreðsdóttir, mentamálaráðharri.

Harumframt hevur stjórnin sett av upp til 14 mia. ISK (~700 mió. DKK) til at lækka rentuna á lestrarlánum frá 1% til 0,4%, broyta afturgjaldslutfallið samsvarandi, veita upp til 15% í avsláttri av lestrarlánum, ið verða afturgoldin áðrenn ætlað og skipanin við borgsmonnum verður slept.

*Sí meira her (á íslendskum) og her (á íslendskum)*




*Mynd 9. Korona støðan o.a. í Íslandi tann 8. juni 2020*

## STUTT UM KORONA STØÐUNA Í ÍSLANDI

28. februar varð fyrsta COVID-19 staðfest í Íslandi. 1.807 eru staðfest smittaði, 1.794 eru vorðin frísk, 10 er deyð og í løtuni eru 3 smittaði. Tilsamans eru 62.870 fólk kannaði, sum svarar til 17,2% (í Føroyum eru 19,8% kannaði). Landspítali (svarar til okkara Landssjúkrahús) stendur fyri kanningunum av einstaklingum, sum kenna sjúkueyðkenni ella hava verið í sambandi við smittaði. Harumframt er gjørligt, at verða kannaður sjálvboðið hjá DeCode, sum er ein privatur stovnur, ið granskar innan ílegur. Kanningarnar hjá DeCode eru gjørdar fyri at fáa umfevnandi innlit í, hvussu smittan spjaðir seg í samfelagnum. Av teimum 62.802 kanningunum, sum eru nevndar omanfyri, hevur DeCode framt uml. 75% av teimum.

Ísland hevur síðan 2005 fyrireikað ætlanir um, hvussu ein møgulig alheimsfarsótt skuldi basast. Áðrenn COVID-19 kom til Íslands, var ráðlegging, uppbýting av ábyrgdarøkjum, bygnaður og mannagongdir til reiðar og nógvar venjingar framdar, skuldi ein alheimsfarsótt verðið veruleiki. Tilbúgvingin varð sett í verk skjótt eftir at fyrstu almennu frágreiðingarnar komu úr Kina, langt áðrenn smittan varð staðfest í Íslandi. Tá fyrsti tilburðurin av koronasmittuni bleiv staðfestur 28. februar, vóru øll til reiðar. Eitt COVID-19 forrit (app) “RakningC19” (Spora) er ment í Íslandi. Hetta hevur verið ein góð hjálp til at fylgja smittutilburðunum.

Íslendska stjórnin hevur lagt fram tríggjar víttfevnandi hjálparpakkar, sum mettir verða at fara at kosta uml. 300 mia. ISK (~15 mia. DKK). Hóast hesar hjálparpakkar, so eru heilt nógv fólk søgd úr starvi, serliga innan ferðavinnuna og hartil knýttar vinnur.

Frá 15. juni opnar Ísland upp fyri, at øll kunnu koma til Íslands, og er ferðavinnan fegin um tað. Í staðin fyri at fara í 14 dagar sóttarhald, kunnu ferðafólkini fáa tikið eina test við komuna til Ísland. Fyrstu tvær vikurnar verður ókeypis at verða testaður, men frá 1. juli skal ferðafólkið sjálvt rinda fyri testina, sum kostar 15.000 ISK (~750 DKK) fyri hvønn. Børn skulu tó ikki testast. Hetta, at ferðafólk sjálvi skulu rinda fyri testina, fellur ikki í góða jørð hjá ferðavinnuni, sum væntar, at nógv ferðafólk fara at halda seg aftur.

*Sí meira her (á íslendskum) og her (á enskum – hagtøl, kunning o.a.)*

*(Útgávudagur 09.06.2020)*

**SENDISTOVA FØROYA Í REYKJAVÍK**
**TÚNGATA 14, 3. HÆÐD**
**101 REYKJAVÍK**

Tlf. +354 511 3200 T-postur: reykjavik@ummr.fo
www.ummr.fo Finn okkum á Facebook